

*Sera vakurt fýrverk varð skotið í luftina yvir høvuðsstaðnum leygarkvøldið*

*Mynd: Martin Sirkovsky*

# Andlát og jarðarferðir

Eirikur Dam, Streymnes ættaður úr Kvívík, andaðist á Landssjúkrahúsinum 27. august, 58 ára gamal. Kistan fer norð hósdagin 30. august, bønarhald verður í Hvalvíkar kirkju klokkan 16. Jarðarferðin verður fríggjadagin 31. august klokkan 14 úr Hvalvíkar kirkju. Sálmabókin verður nýtt. Tey ið vilja minnast Eirik, kunnu lata eina peningagávu til Kirkjuna ella Missiónshúsið, konta í peningastovninum.

Martin Eliasen í Fuglafirði, vanliga nevndur Martin í Beitinum andaðist í heiminum mikudagin, 70 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.



*Marner Jacobsen helt eina røðu við sera áhugaverdum søguligum upplýsingum*




*Øll høvdu høvi at smakka Eik-køkur, tá Eik fylti 175 ár. Grón hevði gjørt køkurnar, sum smakkaðu frálíkt*

# Tøkk

Mína hjartans tøkk sendi eg tykkum øllum, sum á ymsan hátt gjørdu mær 85 ára dagin so hugnaligan og hátíðarligan.
Gud signi tykkum.

**Vinarligar heilsanir**
**Brynhild Næs**



*Eik Banki hevði móttøku á øllum deildum sínum fríggjadagin*



*Nógv fólk støkku inn á gólvið í sambandi við 175 ára dagin hjá Eik fríggjadagin 24. august*

Sosialurin
www.sosialurin.fo



*Ein hin størsta føroyska stjørnan, Eivør Pállsdóttir, undirhelt á 175 ára degnum hjá Eik*

*Mynd: Martin Sirkovsky*



*Um kvøldið var veitsla í Ítróttarhøllini á Hálsi fyri umleið 800 følkum. Her er føroyskur dansur í tjaldinum uttan fyri høllina*